**Toll- og Skattstova Føroya**

# Avloysari fyri løgfrøðing á lógardeildini

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Uppgávurnar hjá stovninum eru m.a. at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta-, avgjalds- og inntøkuskattalógina v.m., eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur umleið 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og í Klaksvík, røkja raksturin.

Stýrið tekur sær av yvirordnaðari planlegging, stýrings-, eftirlits- og menningaruppgávum, av sambandinum við Toll- og Skattaráðið, aðalráðini og landsstýrið, og virkar sum ráðgevi hjá økjunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting.

Á lógardeildini eru 7 størv.

E-mail:

tollskatt@tollskatt.fo

Vegna farloyvi verður søkt eftir avloysara fyri løgfrøðing **at byrja skjótast gjørligt. Starvið er til 1. apríl 2006.**

**Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum verða:**
- Løgfrøðiligir spurningar um meirvirðisgjald, skatt, toll, og onnur avgjøld, herímillum eisini innkrevjing av almennari skuld
- at ráðgeva økisskrivstovunum kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan umsiting stovnsins
- at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum
- at gera ummælir í kærumálum, dómsmálum og
- at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði

**Førleikakrøv**
- Cand. jur. útbúgving
- hava áhuga í at arbeiða við skatti, avgjaldi og innkrevjing
- góð samstarvsevni
- vera fyrikomandi og arbeiðssamur/-som.

Dentur verður eisini lagdur á arbeiðsroyndir innan løgfrøði.

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum er fakliga krevjandi.
- klokkuskipan við flextíð
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

**Setanarøki**
Setanarøkið umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birtu Biskopstø tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi seinasta lagi **13. juni 2005.**

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið
Traðagøta 39
Postsmoga 2151
165 Argir


Starvslýsingar




á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo


# Lærari søkist

Húsa/Syðradals skúli søkir eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2005/2006. Starvið er avlopstímar umleið 21 t. um vikuna. Í skúlanum eru flokkar frá 1.-9. flokk. Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Freistin at søkja er 13. juni.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Skúlastýrið**
v/ Elin Syderbø
796 Húsar (1)
Tlf. 456363

# Miðvágs-Sandavágs skúli

Tey, sum ætla at leiga Ítróttarhøllina á Giljanesi veturin 2005/06 skulu senda skrivliga umsókn til Hallar- og Skúlanevndin v/ Georg F. Hansen, 370 Miðvágur, ella til teldupost: haga@post.olivant.fo innan 15. juni 2005.


Lesið Sosialin

veitst tú ikki tað?
Sosialurin



Finn dreymahúsið í Sosialinum

SETHÚSAMARKNAÐURIN

WWW.SOSIALURIN.FO